# Alt er klárt til felagssangin

**Tað er ikki bara at siga tað, tá skipast skal fyri tiltaki, har eini 10.000 fólk kunnu væntast. Men hjá Tórshavnar kommunu halda tey seg í øllum førum hava gjørt sítt, so alt kann ganga skjótt og væl fyri seg**

ÓLAVSØKA

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á midnátt ólavsøkudag stendur felagssangur á skránni niðri á vaglinum. Tiltakið hevur síðani byrjanina vaksið seg alsamt størri, og í dag man hetta fyri mong vera eitt hugnaligt punktum fyri tjóðarhátíð okkara. Ikki minst, tá tað eftir sangin verður trivið í Ormin langa og okkurt annað av føroysku kvæðunum við.

Men hóast løtan hjá teimum flestu bara er hugnalig – og einki annað – so er tó eisini eitt stórt arbeiði, sum skal gerast, tá skipast skal fyri slíkum tiltaki.

Tí arbeiðinum stílar kommunali myndugleikin fyri, og Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at tey nú eru komin undir land við hesum.

– Vit halda, at alt er klárt til sjálvan sangin. Sangheftini eru prentað, og longu nú ber til at avheinta hesi, men mest týðandi fyri okkum er, at trygdin er í lagi.

– Tað er jú so skjótt, at okkurt kann henda, og tá er gott, at alt trygdarliðið er til reiðar. Vit hava gjørt tað so, at vit hava trý lið av samarittum, sum standa við Løgtingshúsið, gamla Apotek og við Ráðhúsið, og helst skal bera til at fáa fatur á teimum. Harumframt standa bæði sløkkiliðs- og sjúkrabilar klárir beint uttan fyri Miðbýin, soleiðis at hesir alt fyri eitt eru á staðnum, gerst hetta neyðugt. Og í Ráðhúsinum hava vit eitt slag av yvirlitsposti, har fólk støðugt heldur eyga við mannamúgvuni, so at møguligir tilburðir av ymsum slag kunnu uppdagast alt fyri eitt.

– Og lat meg so leggja dent á, at hetta er ikki tí, at vit síggja nakran vanda í stóru løtuni. Men sum sagt, so er umráðandi at hava hesi viðurskifti í lagi, tá mannamúgvan er somikið stór, sigur Heðin.

### Ansið eftir børnunum

Er tað nakað, sum Heðin tó staðiliga heitir á fólk um at gera, so er tað, at tey fyri alt í verðini ikki mugu hava børn ella barnavognar við, um tey ætla sær heilt oman á Vaglið.

– Eitt er, at tað er trupult at koma burtur, ert tú komin oman við barnavogni. Men hartil skal hugsast um, at tá fólk standa stúgvað saman, so er at kalla eingin luft í teirri hæddini, sum børn ganga í. Og tá kann tað gerast heilt hættisligt. Í aðrar mátar er bara at nýta vanligt vit og skil. So ivist eg ikki í, at alt gongur júst so, sum tað skal, sigur borgarstjórin at enda.



*Talan er um eina tí hugnaligastu hugnaløtuna, tá felagssangurin er ólavsøkudag. Vónandi við eini 10.000 sangarum sum luttakarum*

## Sangirnir

Sangheftið til felagssangin er prentað í 10.000 eintøkum, og kann avheintast í Snarskivuni, á Ráðhúsinum og á Kunningarstovuni. Tey hefti, sum eru eftir ólavsøkudag, verða býtt millum fólk uttan fyri Býráðssalin.

Tað verður Martin Mouritsen, sum fer at standa fyri sanginum, meðan Petur Olivar í Hoyvík er skipari, tá kvøðið verður.

Sangirnir í heftinum eru hesir: *Tað hevur tókt millum føroyinga gaman, Í góðum veðri hann dyrgdi, Meg minnist eina mynd, Dýrd á vík og vág, Eg smáttu veit á grønu ong, Mítt føðiland, Kom og dansa, Eg elski hitt gamla, hitt brimbarda býlið, So vakrar moyggjar og knappar menn, Ein gomul kista av kamfertræ, Eins og áarstreymur rennur, Land mítt, Sildavalsurin, Einki er sum summarkvøld við strendur, Hvør skuldi gamlar gøtur gloymt, Nú nemur náttin við smærur, Eg minnist úr gomlum søgum, Boðar tú til allar tjóðir, Nú dagurin at enda er*




Vika 30

# Rentuhækkingarnar um at vera av í USA

MARKNAÐARRÁK

Í síni røðu til senatið í farnu viku greiddi miðbankastjórin Ben Bernanke frá, at búskaparvøksturin í USA í seinnu helvt í ár og næsta ár væntandi fer at minka nakað. Eisini var boðað frá, at teir nú mettu seg at hava fingið tamarhald á prísvøkstrinum og at trýstið nú var mátaligt. Tískil er meiri sannlíkt, at rentuhækkingarnar í USA eru um at vera av á hesum sinni. Hettar fekk renturnar at lækka. Hesi tíðindi, saman við einum fallandi oljuprísi fingu eisini partabrøv, sum seinastu tíðina eru lækkaði av spentu støðuni í miðeystri og høgum oljuprísi, at hækkað aftur.

### Lánsbrævarentur lækkaðar eitt sindur

Lánsbrævarenturnar lækkaðu eitt sindur í farnu viku. Orsøkin eru útlitini til minkandi búskapar- og prísvøkstur í USA. 10 ára rentan er nú 3,98% ið er 0,07% lægri enn fyri viku síðan tá hon var 4,05%.

### Betri rokningskaparúrslit enn væntað

Roknskapirnir hjá Nokia og Nordea gjørdust betri enn væntað. Prísurin á Nordea, hækkaði 4,9%. Tískil kann væntast at hinir norðurlendsku bankarnir, sum kunngerða sínar roknskapir í næstum, eisini kunnu standa seg væl. Apple, Google og Microsoft kunngjørdi góðar roknskapir, meðal Dell niðurmetti síni útlit. Nú 158 fyritøkur av teimum 500 í S&P 500-vísitalinum hava kunngjørt roknskap, sæst at 104 hava størri vinning enn væntað. 27 fyritøkur hava verri, meðan restin var sum væntað. Tær 158 fyritøkurnar hava í miðal 10% meira í vinningi í mun til í fjør. Um roknskapirnir framhaldandi vísa góð úrslit, kann tað stuðla undir, at gongd aftur kemur á jaligur partabrævagondina.

### Hesa vikuna

Roknskaparkunngerðirnar halda áfram. Hesa vikuna standa m.a. oljufeløgini Exxon Mobil, Shell og Norsk Hydro fyri tørni. Umframt rokningskapirnar kann serliga gongdin í miðeystri ávirka marknaðirnar. Eisini brúkaraálitistøl úr USA og Evropa hesa vikuna kunnu ávirka.

**Donsk 10-ára renta**



**Vísital fyri norrøn partabrøv**



**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 590,51 | -0,9% | ↓ |
| JPY | 5,06 | -0,4% | ↓ |
| GBP | 1.093,12 | 0,9% | ↑ |
| NOK | 93,74 | -0,5% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,60 | 0,1% | ↑ |
| | | | |
| Norrøn Partabrøv | 106,84 | 2,6% | ↑ |
| | | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*